## DAGSINS MEINING

# Tíð til javnaðarútspæl?

Nú fullveldisleisturin hjá samgonguni er kolldømdur bæði í Føroyum og í Danmark, hevði ivaleyst verið skilagott um Javnaðarflokkurin gjørdist meira proaktivur og sjálvur spældi út í sjálvstýrismálinum fyri at royna eina breiða semju. Tó eigur flokkurin at bíða fyri at vita, um løgmaður meinar nakað við orðum sínum í Degi og Viku hóskvøldið.

Tjóðveldisflokkurin hevur sett dagsskránna í fullveldismálinum hetta valskeiðið og er tað orsøkin til, at man ivaleyst ongantíð síðan heimastýrislógina er komin so stutt á sjálvstýrisleið í einum valskeiði, sum í tí brátt farna. Javnaðarflokkurin sendi fyrr í hesum valskeiðnum út faldara um sítt uppskot til sjálvstýrislóg. Spurningurin er um ikki flokkurin, nú tá samráðingarnar við donsku stjórnina eru lidnar uttan at Landsstýrið torir at koyra úrslitið til fólkaatkvøðu, eigur at gevast við at sita í bakhond. Flokkurin kundi kanska sum størsti andstøðuflokkur kallað allar hinar flokkarnir til fundar, ein og ein, fyri at vita hvørjum pørtum av uppskotinum til eina sjálvstýrislóg hesir kunnu taka undir við. Hetta kundi so hjálpt flokkinum og øðrum flokkum at snikka saman eina breiða semju, ið allir flokkar uttan ein høvdu kunnað tikið undir við - ilt er at síggja, at Tjóðveldisfl. og Sambandsfl. kunnu taka undir við sama uppskoti. Ivasamt er, eftir at hava sæð arbeiðsháttin hjá teimum eitt nú í Uttanlandsnevndini, um eitt uppskot frá Tjóðveldisfl. kann samla breiðan meiriluta, og løgið er, at Fólkaflokkurin ikki hevur ásannað hetta - ella kanska hevur hann tað í evstu løtu?

Í eini búnari demokratiskari skipan er tað ikki altíð stjórnin, ið kemur við uppskotum til loysnir. Um Javnaðarfl. tók stig til fundarrøð hevði verið spennandi at sæð um samgonguflokkarnir høvdu verið vaksnir nokk at medvirka konstruktivt. Føgru orðini um breiðar semjur og sakligt orðaskifti røkka ikki altíð so langt, tá á stendur. Tað vísir seg, at allur kritikkur av fullveldismálinum verður kveistraður til viks av varaløgmanni sum partapolitiskt kegl. Løgið er, at einasti flokkur í Føroyum og ivaleyst í allari verðini, ið ikki førir partapolitikk, er Tjóðveldisfl., ið eftir øllum at døma sum tann einasti hevur innlit í onkran óreingiligan sannleika. Tjóðveldisfl. vil eftir øllum at døma koyra solo í fullveldismálinum, ið vit síggja tað við tí skuggaspæli, ið gongur fyri seg í Tinganesi í dag. Spurningurin er, um tíðin ikki er búgvin til eitt javnaðarútspæl, ásannandi at møguleikin fyri breiðari semju um eitt tjóðveldisuppskot í besta føri er lítil. Kanska síðstu útmeldingarnar frá løgmanni gera hetta óneyðugt - livst so spyrst.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

# Starvsdagar hjá fútanum

### 40 ár

Nakað fyri jól kundi reingerðarkvinnan, Marta Poulsen, í Havn halda 40 ára starvsdag í politinum. Í hesum sambandi var hugnaløta og nógv fólk møtti. Marta byrjaði at vaska á politistøðini í Kristines Minde í Bringsnagøtu í 1960. Tað er har Stuðulsfólkaskipanin heldur til í dag.



Tá nýggj politistøð varð bygd í Jónar Bronksgøtu í 1967 flutti hon niðan og hevur vaskað har síðan. Marta legði frá sær 1. desember vegna aldur.

Hon hevur nú fyrst í nýggja árinum fingið handað "politiets hæderstegn", sum upprunaliga varð stovnað av kongi 18. juni 1959.

### 25 ár

Varafútin Finn Ougaard hevði herfyri 25 ára starvsdag hjá politinum. Ougaard er kendur kring landið, tí hann er ákærin, sum møtir í rættinum, føroyingar eru skuldsettir fyri at hava brotið lógina, og tað er hansara uppgáva, er begrundaður illgruni, at fáa teir skuldsettu ákærdar.





### 25 ár

Virkandi sýslumaður í Klaksvík, Hans L. Djurhuus hevur eisini havt 25 ára starvsdag hjá politinum. Hann er føddur 24. januar í 1951 í Porkeri. Hann byrjaði á Politiskúlanum 1. november í 1975.

Í november 1985 varð hann settur varaleiðari fyri sýslumannin, og síðani 18. mai 1998 hevur hann verið virkandi sýslumaður í Klaksvík, tá ið Karsten Hansen gjørdist landsstýrismaður.



### 25 ár

Politiassistentur Tóri Midjord hevur hildið 25 ára starvsdag hjá politinum. Hann er føddur 13. februar 1950 í Vági, og byrjaði eisin hann á Politiskúlanum 1. november í 1975.

Eftir lokna útbúgving varð hann settur politistur í Klaksvík, til hann 1. januar 1979 varð settur politistur í Havn.



### 25 ár

Yvirassistentur Guðrun á Borg í Havn hevur arbeitt í 29 ár á Fútaskrivstovuni í Havn.

Øll hesi starvsfólk hjá Føroya Landfúta fáa í sambandi við starvsdagarnar pr. 1. januar 2001 »Politiets hæderstegn«, sum upprunaliga var stovnað av kongi 18. juni í 1959, sigur Uni Vestureið, politiinspektørur.

## Spyrjið serfrøðingarnar

Adressan:
Sosialurin,
box 76,
110 Tórshavn,
Fax 314720
ella teldupost:

spyr@sosialurin.fo

– og merkið, hvørjum tit seta spurningum.

**Svarini verða prentað í blaðnum mikudag**


## Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu og sýndu samkenslu, tá kæri maður, pápi, abbi, verfaðir og bróðir okkara

**Terje Dal Christiansen**

andaðist og varð jarðaður Í Havn 5. januar 2001

**Sunnvá**



**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# Gera neyðloysn í Suðuroy

**Beinanvegin tað varð greitt, at busskoyringin hjá bygdaleiðum í Suðuroy fór at verða niðurløgd, fór Strandferðslan í holt við royna at fáa eina neyðloysn á føtur**

SÁTTMÁLATRÆTA
*Áki Bertholdsen*



*– Nú busskoyringin í Suðuroynni er niðurløgd, hevur Strandferðslan roynt at fáa eina neyðloysn á føtur, so at alt ikki liggur stilt. Í gjár koyrdu sjey hýruvognar skúlabørn, men avtalurnar eru bara fyri ein dag ísenn og enn veit ongin, hvussu tað verður í næstu viku.*

Hósmorginin varð øll koyringin hjá bygdaleiðum í Suðuroynni niðurløgd tí at Strandferðslan og teir, sum koyra buss, kundu ikki semjast um ein nýggjan sáttmála.

Og tað er fullkomiliga óvist, nær busskoyringin verður tikin uppaftur.

Men tað er ikki vist, at støðan verður heilt ring kortini og at almenna samferðslan í Suðuroy fer at liggja fullkomiliga lamin.

Tí beinanvegin bussførararnir løgdu arbeiðið niður, fór Strandferðslan at kanna eftir, um tað ikki kundi lata seg gera at skipa okkurt slag av neyðloysn, so at onkur flutningur var.

Reidar Nónfjall sigur, at eitt nú varð hugsað um flutning til og frá Smyrli og um skúlakoyringina.

Tí sum er, verða ongar rutur koyrdar til og frá Smyrli og skúlabørn verða ikki koyrd til og frá skúla. Fyribils hevur hetta havt tær avleiðingar, at Miðnámsskúlin í Suðuroy avlýsti skúlagongdina, men frígjadagin varð hon tikin uppaftur.

Aðrir skúlar hava ikki avlýst. Men skúlagongdin er kortini merkt av støðuni, tí summi børn, sum vanliga brúka buss, vóru heima í gjár.

– Vit fara nú at vita, hvussu umfatandi skúlaflutningurin er, m.a. hvussu nógvir skúlanæmingar talan er um, sum skulu flytast aftur og fram. Og so fáa vit at síggja, hvat kann gerast. Ein loysn, sum rættiliga skjótt varð hugsað um, var at fáa hýruvognar at røkja nakrar tær mest neyðugu ruturnar, so at ikki alt steðgar.

Í øllum førum er tað nógv sum bendir á, at tað verður brúk fyri eini slíkari neyðrutu, tí enn er tað ongin, sum veit, nær vanliga busskoyringin verður tikin uppaftur

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni, sigur, at hansara uppfatan er ikki, at samráðingarnar eru slitnaðar, men at hann má hava nakar dagar at rokna út, hvørjar fíggjarligar avleiðingar krøvini frá bussførarunum fáa.

Uni Mortensen, sum hevur verið talsmaður hjá bussførarunum í Suðuroy, sigur, at onki kann henda, fyrrenn teir hava fingið eitt tilboð, sum kann takast í álvara frá Strandferðsluni.

Annars er hann ikki fegin um, at onkur annar fer at átaka sær koyringina, sum teir hava lagt niður.

– Ger nakar tað, er tað ein spurningur um samhaldsfesti sigur hann.

Men hann heldur eisini, at tað er løgið, at Strandferðslan ikki vil betala bussførarunum løn, men ikki hevur nakað ímóti at betala øðrum løn fyri at gera hetta sama arbeiði.

At átaka sær verkfalsrakt arbeiði, plagar ikki at verða væl dámt, men fyribils er tað bara Føroya Arbeiðarafelag, sum hevur noktað sínum limum at átaka sær rutukoyring í Suðuroynni, so leingi arbeiðsósemjan er.

### Bara skúlakoyring

Í gjáramorgunin hevði tað eydnast Strandferðsluni at fáa nakrar rutur á føtur. Avtalað er gjørd við nakrar hýruvognar um at koyra skúlabørn. Men tað hevur ikki eydnast at fáa alla skúlakoyringina í gongd aftur.

Av Strandferðsluni verður sagt, at í gjár blivu skúlabørn koyrd úr Sandvík til Hvalbiar og haðani upp á Tvøroyri, av Tvøroyri til Miðnámsskúlan í Vági og úr Sumba til Vágs.

Avtalað varð gjørd við sjey hýruvognar um at koyra. Men avtalurnar eru bara fyri ein daf ísenn, so enn er tað ongin, sum veit, hvussu tað verður við koyringini í næstu viku.

Annars eru tað í rættiliga stóran mum foreldur, sum taka sær av skúlakoyringini hesar dagarnar

Hinvegin sær Strandferðslan seg ikki føra fyri at gera nakað við koyring til og frá Smyrli, so tað mugu fólk avgreiða sjálvi.

# Prix Føroyar slær met

**Tilmeldingin til Prix Føroyar er so stóra, at nú umhugsa fyrireikararnir at minka um tíðina, sum hvør bólkur fær at spæla í**

PRIX FØROYAR
*Eyðun Klakstein*

Tilmeldingin til Prix Føroyar 2001 er metstór, og hóast fyrireikararnir fegnast um ovurstóra áhuganum fyri kappingini, skapar tilmeldingin eisini trupulleikar.

Bólkarnir verða 39 í tali, og tá innleiðandi umførini bert eru fýra, skulu í miðal 10 bólkar spæla til hvørt innleiðandi umfar.

– Vit umhugsa at skerja tíðina, sum bólkarnir í mesta lagi kunnu spæla, tí tað verða so nógvir bólkar til hvørt umfar, sigur Fróði Vestergaard, sum er samskipari av Prix Føroyum.

Fyriskiparar av kappingini eru Norðurlandahúsið í Føroyum, FUT, SvF og ÚF.

### Alt skal passa saman

Til innleiðandi kappingarnar skulu bólkarnar spæla í minsta lagi eitt korter og í mesta lagi ein hálvan tíma.

– Vit fara kanska at skerja mest lovydu tíðina við fimm ella tíggju minuttum, sigur Fróði Vestergaard.

Í finaluni spæla bólkarnir í eitt korter hvør, og tí halda fyrireikararnir, at tað ber til at skerja tíðina í innleiðandi umførunum. Eingin avgerð er tó tikin um hetta enn.

Komandi dagarnar skal Fróði Vestergaard fáa eitt størri putlispæl at ganga upp, tí teir 39 bólkarnir skulu býtast út á fýra innleiðandi umfar, og nógv viðurskifti skulu passa saman.

Tí kann tað enda við, at í onkrum innleiðandi umfari verða sjey ella átta bólkar, meðan eini 12 bólkar verða í øðrum innleiðandi umfari.

### Fýra innleiðandi umfør

Innleiðandi umførini verða í Vági 27. januar, á Strondum 3. februar, í Klaksvík 23. februar og í Miðvági 3. mars

Finalan, sum plagar at verða sjónvarpað og útvarpað beinleiðis, verður í Norðurlandahúsinum 21. apríl.

Vinningarnir eru fleiri, og ikki allir eru komnir upp á pláss enn. Ein bólkur sleppur at spæla á Nibe og Jelling Festival, og fyrireikararnir fyri hesar festivalar avgera sjálvir, hvør bólkurin verður. Tað er tí ikki vist, at tað verður vinnarin av kappingini.

## Hesir bólkar hava meldað til Prix Føroyar 2001

Z-Free, Multiple-Choice, Diatribes, Týr, Feedback, Noplay, Speak, IRIS, Flux, Epot, I Am, No Connection, Marigold, Janus Trúgvason, Grønt Fót Slím, Pínadoy, B&Z, Human Chaos, PS, Sólva og menn, Daybreak, All That Rain, Dynamitt 2000, Krit, Phanthoms, Lítla Rúm, Hokus Pokus, Remote, Tangz, I is, Déjá Vu, Happy, Masha, M.M.M., AHOU, Holgar og Vilmenn, Bólkurin 200, Legazy og MAS


ÚTSØLA
byrjar mánamorgunin
08.01.01. kl. 08.00
ALT
1/2 prísur
NOA NOA
BROR & SØSTER
TRANSIT PAR-SUCH
TONE BARKER
Opið er til kl. 20.00
29
Í Tróndargøtu
tel. 31 82 00
ella 21 81 99